***SÁTTMÁLAR***

**millum**

**Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna**

**og**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag / Føroya Handverksmeistarafelag**

1. oktober ~~2018~~2020

*INNIHALDSYVIRLIT*

***Kapittul 1: Sáttmálaøkið*** ... ***4***
§ 1. Avtaluøkið ... 4

***Kapittul 2: Setanarviðurskifti*** ... ***4***
§ 2. Setanarskriv ... 4
Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg um setanarprógv. ... 4
§ 3. Skaðar ... 4
§ 4. Uppsøgn ... 4

***Kapittul 3: Arbeiðstíð*** ... ***6***
§ 5. Arbeiðstíð ... 6
§ 6. Mattíð ... 6
§ 7. Skiftisarbeiði ... 6
§ 8 Yvirtíð ... 6
§ 9. Frídagar ... 7

***Kapittul 4: Løn*** ... ***7***
§ 10. Sveinalønir longri handverksútbúgvingar ... 7
§11. Sveinalønir styttri handverkaraútbúgvingar ... 7
§ 12. Starvsaldur ... 7
§ 13. Serarbeiðaralønir ... 8
§ 14. Seinkað arbeiði ... 8
§ 15. Viðbøtur o.l. % vera roknaði av eini vanligari handverkaraløn. ... 8
§ 16. Akkordarbeiði ... 9
§ 17. Skiftiholdslønir ... 9
§ 18. Forskotin tíð (bakarar og servicefak) ... 9
§ 19. Útgreinaðar reglur um koyring og burturarbeiði hjá handverkarum og serarbeiðarum ... 10~~9~~
§ 20. Yvirtíðarløn ... 12
§21 ... 12
§ 22. Útgjalding ... 13~~12~~
§ 23. Tilkallivakt ... 13

***Kapittul 5: Gjøld*** ... ***13***
§ 24. Limagjald ... 13
§ 25. Útbúgvingargrunnur ... 13
§ 26. Eftirløn og lívstrygging ... 13

***Kapittul 6: Aðrar ásetingar*** ... ***14***
§ 27. Etingar- og klædnarúm ... 14
§ 28. Arbeiðsklæðir, verndarklæðir og útsúgving ... 14

***Kapittul 7: Skipanarviðurskifti*** ... ***15***
§ 31 ... 15
§ 32. Arbeiðsmans arbeiði ... 15
§ 33. Viðurskiftir hjá nevndarlimum ... 15
§ 34. Ósemja um arbeiðið ... 15
§ 35. Álitismannaskipan ... 16
§ 36. Sersáttmáli ... 16

***Kapittul 8: Gildi og uppsøgn*** ... ***16***
§ 37. Gildi og uppsøgn ... 16

***Álitismannaskipan*** ... ***17***

***FASTLØNARSÁTTMÁLI*** ... ***19***
§ 1. Setan ... 19
§ 2. Løn ... 19
§ 3. Yvirtíðarløn ... 19
§ 4. Avspassering ... 19

§ 5. Tænastuferðir ..... 19
§ 6. Fastir frídagar ..... 20
§ 7. Frítíðarreglur ..... 20
§ 8. Farloyvi o.a. ..... 20
§ 9. Barsilsfarloyvi ..... 20
§ 10. Reglur fyri sjúkraløn, eftirsituløn o.a. ..... 20
§ 11. Uppsøgn ..... 20
§ 12. Útbúgvingargrunnur ..... 21
§ 13. Eftirlønargrunnur ..... 21
§ 14. Arbeiðsklæði, verndarklæði og útsúgving ..... 21
§ 15. Seravtalur ..... 21
§ 16. Gildi sáttmálans ..... 21

***Lærlingasáttmáli* ..... *22***

§ 2. Arbeiðstíð ..... 22
§ 3. Skiftisarbeiði ..... 22
§ 4. Frítíðarløn ..... 22
§ 5. Barsil ..... 22
§ 6. Sjúka ..... 22
§ 7. Frídagar ..... 23
§ 8. Løn ..... 23
§ 9. Løn í skúlatíðini ..... 23
§ 10. Koyring og burturarbeiði ..... 23
§ 11. Eftirløn ..... 23
§ 12. Lønarútgjalding ..... 23
§ 13. Yvirtíð ..... 24~~23~~
§ 14. Arbeiðssteðgur ..... 24
§ 15. Forskotin tíð ..... 24
§ 16. Limagjald ..... 24
§ 17. Arbeiðsklæði, verndarklæðir og útsúgving ..... 25~~24~~
§ 18. Gildi og uppsøgn ..... 25

***REGLUGERÐ FYRI VITAN* ..... *26***

***Akkordløn hjá autolakerarum* ..... *29***

# Kapittul 1: Sáttmálaøkið

**§ 1. Avtaluøkið**

Stk. 1. Hesin sáttmáli fevnir um fólk við eini handverkaraútbúgving, og hvørs starv liggur innan handverkaraøkið – hereftir nevnd handverkarar. Eisini fevnir sáttmálin um serarbeiðarar (specialarbeiðarar) innan handverkaraøkið.
Stk. 2. Fyri at arbeiða sum handverkari, skal viðkomandi kunna prógva útbúgving sambært galdandi yrkisútbúgvingarlóg ella aðra útbúgving, ið kann góðtakast av meginfeløgunum.
Stk. 3. Fyri at arbeiða sum serarbeiðari, skal viðkomandi kunna prógva útbúgving sum serarbeiðari. Tá ivamál um útbúgving stinga seg upp, verða felagsstjórnirnar at samráðast um hetta, til føst skipan er løgd viðvíkjandi útbúgving og treytum o.a.
Stk. 4. Í ivamálum um hesa grein taka stjórnir handverksmeistaranna og handverkaranna í samráð avgerð.

# Kapittul 2: Setanarviðurskifti

**§ 2. Setanarskriv**

Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg um setanarprógv.

**§ 3. Skaðar**

Stk. 1. Kemur handverkari til skaða í arbeiðstíðini, skal meistarin ella virkið við einari helvt, og handverkarafelagið við hini helvtini, í upp til ~~12~~ 10 dagar, gjalda honum munin ímillum vanliga vikuløn og tað, sum goldið verður frá dagpeningaskipanini.
Stk. 2. Læknaváttan skal leggjast fram, um so er at meistarin ella virkið krevja tað. (Hóast dagpeningaskipanina.)
Stk. 3. Verður handverkari, sum hevur arbeitt hjá sama meistara í meira enn 9 mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsakað av einum arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini, hevur arbeiðsgevari, aftaná at tíðarskeiðið í stk. 1 er endað, skyldu at rinda munin millum dagpeningaveitingina og vanligu lønina, sum handverkari hevði fingið útgoldna, um viðkomandi ikki fekk skaðan.

Gjaldskyldan hjá meistara stendur við inntil handverkari aftur er arbeiðsførur tó í mesta lagi ~~4~~ 5 mánaðir aftaná, at arbeiðsskaðin er hendur.

**§ 4. Uppsøgn**

Stk. 1. Handverkari má ikki verða koyrdur úr ella rýma úr arbeiði uttan orsøk.
Stk. 2. Uppsagnartíðin er

- 5 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 3 mánaðir

- 10 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 6 mánaðir
- 20 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 2 ár
- 30 arbeiðsdagar fyri starvstíð meira enn 5 ár.

Stk. 3. Uppsagnartíðin er galdandi fyri báðar partar. Uppsøgnin skal vera skrivlig fyri báðar partar. Brot móti hesum verður sektað við ávikavist fyri handverkara við missi av dagslønum svarandi til helvtina av uppsagnartíðini og fyri meistara við at gjalda somu upphædd.

Stk 4. Uppsagnir skulu byggja á rímuligar grundir. Arbeiðsgevarin skal skrivliga grundgeva fyri uppsøgnini, um tann uppsagdi biður um tað. Grundgevingin kann bert vera kravd, um tan uppsagdi hevur verið starvssettur í minst 9 mánaðar.

Stk. 5. Verður handverkari, sum hevur arbeitt hjá sama meistara í meira enn 9 mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsaka av einum arbeiðsskaða, sum er arbeiðsskaði sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini, kann viðkomandi ikki sigast úr starvi fyrr enn ~~6~~ 7 mánaðir, aftaná arbeiðsskaðin er hendur. Hetta er tó bert galdandi, inntil handverkari aftur er arbeiðsførur.

# Kapittul 3: Arbeiðstíð

**§ 5. Arbeiðstíð**

Stk. 1. Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar frá 1. januar 1980 sambært løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1978. Dagliga arbeiðstíðin verður at liggja innan fyri tíðarskeiðini frá og við mánadag til og við fríggjadag millum kl. 6.00 og 18.00.
Stk. 2. Arbeiðstíðin á matstovum, gistingarhúsum o.l. er 40 tímar um vikuna sambært arbeiðsætlan, sum løgd verður fyri fýra vikur í senn. Starvsfólk skulu hava arbeiðsætlanina í seinasta lagi 7 dagar áðrenn hon kemur í gildi.

**§ 6. Mattíð**

Stk. 1. Tað skal standa arbeiðsplássinum frítt at leggja døgurðatíðina soleiðis, sum semja fæst um. Vanligur meiriluti av handverkarum, serarbeiðarum og meistara á arbeiðsplássinum skal vera fyri hesum og atkvøðast skal við seðlum.
Stk. 2. Tað mugu ikki ganga meira enn 4 tímar millum mattíðirnar.

**§ 7. Skiftisarbeiði**

Stk. 1. Um tørvur er á tí, kann arbeiðstíðin í hvørjum einstøkum føri við samráðing handverkaranna og meistaranna millum leggjast millum kl. 07 og 07 dagin eftir, og verða skipað sum skiftisarbeiði við løn sambært § 17.
Stk. 2. Tá ið arbeitt verður í skiftum, verður mattíðin ikki frádrigin fyri 2. og 3. holdið.

**§ 8 Yvirtíð**

Stk. 1. Yvirarbeiðstíð verður ikki roknað, fyrrenn vanligi arbeiðsdagurin sambært avtalu er vunnin (8 tímar), um høvi hevur verið til tess.
Stk. 2. Fráboðan um yvirtíð skal gevast áðrenn døgverða, um tað letur seg gera.

**Mattíð í samb . við yvirtíð**
Stk. 3. Verður arbeitt yvirtíð, verður mattíð skipað sum higartil á teimum ymsu arbeiðsplássunum og ikki frádrigin lønini.
Stk. 4. Verður arbeitt yvir í 2 tímar, er loyvt at fáa sær drekka, ið ikki verður frádrigið í løn. Men tað er ikki loyvt at fara av arbeiðsplássinum at fáa sær drekka.
Stk. 5. Verður arbeitt yvir í 4 tímar, verður mattíðin ein tími, ið heldur ikki verður frádrigin lønini.

**§ 9. Frídagar**

Stk. 1. 1. mai, ólavsøkudagur og nýggjársaftan eru heilir frídagar. Flaggdagur, grundlógardagur og 1. november og jólaaftan eru frídagar aftaná kl. 12.

Stk 2. Arbeiðsgevari og meiriluti av starvsfólkunum á plássinum kunnu avtala at leggja hálvar frídagar saman til heilar frídagar, galdandi fyri alt arbeiðsplássið. Hetta merkir, at hesir heilu frídagar liggja á einum av teimum hálvu frídøgunum, meðan tann hálvi arbeiðsdagurin verður vanligur fullur arbeiðsdagur. Verður arbeitt á einum heilum samanløgdum frídegi, verður hetta lønt sambært § 20, stk. 2. Verður arbeitt á einum heilum samanløgdum arbeiðsdegi, verður hetta lønt sum vanligur arbeiðsdagur.

## Kapittul 4: Løn

**§ 10. Sveinalønir longri handverksútbúgvingar**

Stk. 1.
Tann 1. oktober 2019 hækkar sveinalønin við 2,56% og verður tá 147,89 kr.
Tann 1. ~~oktober 2018~~januar 2021 hækkar sveinalønin við ~~2,59~~1,95%, og verður tá ~~144,20~~150,77 kr.
Tann 1. oktober ~~2019~~ 2021 hækkar sveinalønin við ~~2,56~~1,25%, og verður tá ~~147,89~~152,65 kr.

Stk. 2. Lønin er at skilja sum minstaløn.

**§11. Sveinalønir styttri handverkaraútbúgvingar**

Stk.1.
Tann 1. oktober 2019 er sveinalønin fyri styttri handverkaraútbúgvingar 141,93 kr.
Tann 1. ~~oktober 2018~~januar 2021 er sveinalønin fyri styttri handverksútbúgvingar ~~138,38~~144,70 kr.
Tann 1. oktober ~~2019~~ 2021 er sveinalønin fyri styttri handverksútbúgvingar ~~141,93~~146,51 kr.

Stk. 2. Lønin er at skilja sum minstaløn.

**§ 12. Starvsaldur**

Sveinar fáa hesar starvsaldursviðbøtur:
Eftir 3 ára starvstíð verður viðbótin 2,5% av grundlønini. Eftir hetta avtala arbeiðsgevari og handverkari viðbótarhækkingar sínamillum við hóskandi millumbili. Í setanarpróvnum verður nágreinað, nær starvsaldursviðbótin skal endurskoðast.

Starvstíð er at skilja sum tíð í starvi ~~hjá føroyskum arbeiðsgevara, og~~ innan yrkið, sum viðkomandi hevur tikið sveinaprógv í.

Sveinar hava rætt til at flyta starvstíð frá einum arbeiðsgevara til annan, um teir ikki hava verið

burtur frá arbeiðsøki sínum longur enn 7 ár.

Starvsaldur skal ávísast í setanarpróvnum. Handverkari skal kunna um møguliga starvstíð frá øðrum arbeiðsgevara við setan, tá setanarprógvið verður undirskrivað.

## § 13. Serarbeiðaralønir

Tann 1. oktober 2019 er tímalønin
a) hjá serarbeiðara í handverksfakinum við útbúgving kr. 138,20
b) serarbeiðari uttan útbúgving

| | |
|---|---|
| 1. árið | kr. 132,63 |
| 2. árið | 1,45% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |
| 3. árið | 2,92% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |
| 4. árið og fylgjandi ár | 4,41% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |

Tann 1. ~~oktober 2018~~januar 2021 er tímalønin
a) hjá serarbeiðara í handverksfakinum við útbúgving kr. ~~134,75~~140,89
b) serarbeiðari uttan útbúgving

| | |
|---|---|
| 1. árið | kr. ~~129,06~~134,94 |
| 2. árið | 1,45% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |
| 3. árið | 2,92% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |
| 4. árið og fylgjandi ár | 4,41% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |

Tann 1. oktober 2021~~19~~ er tímalønin
a) hjá serarbeiðara í handverksfakinum við útbúgving kr. ~~138,20~~142,66
b) serarbeiðari uttan útbúgving

| | |
|---|---|
| 1. árið | kr. ~~132,36~~136,63 |
| 2. árið | 1,45% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |
| 3. árið | 2,92% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |
| 4. árið og fylgjandi ár | 4,41% afturat serarbeiðaralønini uttan útbúgving 1. árið. |

## § 14. Seinkað arbeiði

Møtir handverkari á arbeiðsplássi til ta avtalaðu tíðina, og arbeiðið ikki verður byrjað, skal hann hava løn fyri 2 tímar. Verður arbeiðið byrjað seinri enn avtalað, skal hann hava løn fyri ta tíð, ið farin er.

## § 15. Viðbøtur o.l. % vera roknaði av eini vanligari handverkaraløn.

Stk. 1. Amboðspeningur 1,5% um tíman, um handverkarin heldur seg við øllum vanligum handamboðum, ið eru neyðug fyri fakið.
Stk. 2. Skitið arbeiðspeningur 0,5% um tíman.
Stk. 3. Fyri arbeiði við nýgerð av tunli, arbeiði í dampketli, arbeiði í brúktum olju-, lýsi og øðrum tangum og annars inni í smáum tangum, og fyri arbeiðir í skittfiska- og sildalastum

verður goldið 10% eyka um tíman.
Stk. 4. Smáir tangar kunna definerast sum tangar, ið eru minni enn manshædd allar vegir. Um serliga trong øki eru í tangum, verður tað annars til partarnar á hvørjum virki sær at semjast um.
Stk. 5. Partarnir á hvørjum virki sær kunnu avtalað aðra og hægri tímaviðbót fyri arbeiðir, sum eru nevnd í stk. 3. Verður slík viðbót avtalað, fellur viðbótin í stk. 3. burtur, og tann avtalaða viðbótin kemur ístaðin.
Stk.6. Semjast partarnir á einum virki um, at talan er um óvanliga skitið arbeiði, fyri hesa yrkisgrein, men hetta ikki er nevnt í stk. 3, verður sama viðbót goldin sum í stk. 3. Annars kann viðbót avtalast eftir somu ásetingum sum í stk. 5.

## § 16. Akkordarbeiði

Stk. 1. Har arbeiði og umstøðurnar eru til tess, at akkord er gjørlig, skulu meistarar og sveinar fáa akkord í lag og avtala eitt tímatal ella eina krónuupphædd fyri arbeiðið. Avtalan skal gerast í byrjunnarstigi. Avtalan skal vera skrivlig og undirskrivast av báðum pørtum.
Stk. 2. Tað verður álagt pørtum at samráðast um akkordarbeiði á øllum økjum, har tað er gjørligt.
Stk. 3. Verður álagt at arbeiða yvirtíð við akkord, verður lønin at hækka sambært § 20.
Stk. 4. Partarnir eru samdir um at gera standardavtaluseðlar og møguliga ein prískurant.

## § 17. Skiftiholdslønir

Stk. 1.
1. holdið: vanlig løn.
2. holdið: vanlig løn + 6,63%
3. holdið: vanlig løn + 9,11%

Stk. 2. Um yvirtíð, sí § 20.

## § 18. Forskotin tíð (bakarar og servicefak)

Stk. 1. Bakarar
Fyri at arbeiða frá kl. 4.00 til kl. 6.00 fáa bakarar 55% av vanligari sáttmálaløn sambært §10 eyka um tíman vanligar yrkadagar og 70% av vanligari sáttmálaløn sambært §10 eyka leygardag og halgidagar.

Stk. 2. Servicefak
Har sum vanligt er fyri einstøk fak (servicefak) at arbeiða leygardag verður latið eyka:

| | |
|---|---|
| kl. 8.00 - 14.00 ...................... | 35 % |
| kl. 14.00 - úteftir....................... | 100 % |

**§ 19. Útgreinaðar reglur um koyring og burturarbeiði hjá handverkarum og serarbeiðarum**

Stk. 1. Handverkari verður settur í starv eftir setanarskrivi við einum av hesum trimum møguleikunum:

A. Handverkari við føstum arbeiðsstaði
B. Handverkari við skiftandi føstum arbeiðsstaði
C. Handverkari sum veitir kundum tænastur / servicefólk

Handverkari settur eftir A er størsta partin av tíðini á einum arbeiðsstaði. Arbeiðsplássið er skrásett adressa hjá fyritøkuni. Handverkari settur eftir B arbeiðir t.d. í byggivinnuni, og hevur tí ymisk byggipláss sum fast arbeiðsstað í eina ávísa tíð. Handverkari settur eftir C veitir skiftandi kundum tænastur og koyrir regluliga út at loysa uppgávur á staðnum – vanliga kalla servicefólk, ið ikki hava fast arbeiðsstað.

Stk. 2. Skilt verður millum Útiarbeiði og Burturarbeiði.

Útiarbeiði er: Arbeiði, sum verður gjørt aðrastaðni enn á tí arbeiðsplássi, har viðkomandi er starvssettur sambært setanarskrivinum, og handverkarin kann koma fram og aftur sama dag.

Burturarbeiði er: Arbeiði, sum verður gjørt aðrastaðni enn á tí arbeiðsplássi, har viðkomandi er starvssettur sambært setansrskrivinum, og neyðugt er at gista.

Stk. 3. Ferðingartíð frá heimi og til arbeiðspláss og aftur telur sum meginregla ikki við í arbeiðstíðina.

**Stk. 4. Fyri fólk sett eftir A (fast arbeiðsstað) er fylgjandi galdandi:**

Útiarbeiði:

a) Tá handverkari er møttur til arbeiðis á fasta arbeiðsstaðnum og verður sendur aðrastaðni at arbeiða, og arbeiðsdagurin íroknað ferðingartíð verður longri enn 8 tímar, verður løn í ferðingartíðini goldin sambært § 18, stk. 1 og stk. 2.

b) Ferðing til útiarbeiðsplássið verður tó bara lønt í tann mun hetta tekur longri tíð enn til fasta arbeiðsstaðið.

c) Fyri beinleiðis ferðaútreiðslur verður goldið soleiðis:
    i) Verður almennur flutningur nýttur millum heim og útiarbeiðspláss, verður goldið fyri ferðaútreiðslur í tann mun hesar eru størri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum.

    ii) Nýtir handverkari egnan bil til flutningin millum heim og útiarbeiðspláss, verður samsýning latin fyri hvønn kilometur, men tó bert í tann mun hesir eru fleiri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum. Henda samsýning verður latin eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna. Goldið verður eisini fyri flutning við ferju, møguligt tunnilsgjald vm.

    iii) Skipar fyritøkan sjálv fyri flutninginum, verður einki endurgjald latið fyri

beinleiðis flutningsútreiðslur.

d) Meistarin hevur ikki skyldu at rinda fyri kost. Undantikið er tó, um handverkarin ikki visti av, at hann skuldi røkja útiarbeiði. Hettar merkir, at handverkarin skal hava boð um útiarbeiði í seinasta lagi dagin fyri. Verður hettar ikki gjørt, hevur meistarin skyldu at rinda fyri kost.

Burturarbeiði (Somu ásetingar sum undir Útiarbeiði, tó við hesari broyting):

Meistarin hevur skyldu at rinda fyri vistarhald (kost og logi). Skipar meistarin ikki fyri vistarhaldinum, hevur hann skyldu at gjalda eftir rokning á rímuligum støði, um ikki onnur avtalað fyriliggur.

**Stk. 5. Fyri fólk sett eftir B (skiftandi fast arbeiðsstað) er fylgjandi galdandi:**

Útiarbeiði:

a) Ferðing til útiarbeiðsplássið verður lønt í tann mun hetta tekur longri tíð enn til fasta arbeiðsstaðið.

b) Fyri beinleiðis ferðaútreiðslur verður goldið soleiðis:
   - i) Verður almennur flutningur nýttur millum heim og útiarbeiðspláss, verður goldið fyri ferðaútreiðslur í tann mun hesar eru størri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum.
   - ii) Nýtir handverkari egnan bil til flutningin millum heim og útiarbeiðspláss, verður samsýning latin fyri hvønn kilometur, men tó bert í tann mun hesir eru fleiri, enn um møtt varð á fasta arbeiðsstaðnum. Henda samsýning verður latin eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna. Goldið verður eisini fyri flutning við ferju, møguligt tunnilsgjald vm.
   - iii) Skipar fyritøkan sjálv fyri flutninginum, verður einki endurgjald latið fyri beinleiðis flutningsútreiðslur.

c) Meistarin hevur ikki skyldu at rinda fyri kost. Undantikið er tó, um handverkarin ikki visti av, at hann skuldi røkja útiarbeiði. Hettar merkir, at handverkarin skal hava boð um útiarbeiði í seinasta lagi dagin fyri. Verður hettar ikki gjørt, hevur meistarin skyldu at rinda fyri kost.

Burturarbeiði (Somu ásetingar sum undir Útiarbeiði, tó við hesari broyting):

d) Meistarin hevur skyldu at rinda fyri vistarhald (kost og logi). Skipar meistarin ikki fyri vistarhaldinum, hevur hann skyldu at gjalda eftir rokning á rímuligum støði, um ikki onnur avtalað fyriliggur.

**Stk. 6. Fyri fólk sett eftir C (servicefólk)**

a) Tá fólk vera sett við seturnarskrivi í bólki C, skal serlig avtala gerðast millum arbeiðsgevara og servicefólk um arbeiðsumstøðurnar.
b) Fyri burturarbeiði verður tað sama galdandi, sum fyri setunarbólkarnar A og B.

Stk. 7. Ferðing uttanlands: Ferðing uttanlands verður samsýnt sambært teimum almennu reglunum, um eingin onnur avtala er gjørd.

Stk. 8. Nýtsla av egnum bili í samband við tænastu fyri meistarin: Nýtir handverkarin egnan bil í arbeiðsørindum, fær hann samsýning fyri hvønn koyrdan kilometur, eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglum hjá tí almenna.

Stk. 9. Meistarin kann soleiðis ikki áleggja handverkaranum at nýta egnan bil í samband við arbeiði.

Stk. 10. Fyri starvsfólk sett innan 1. oktober 2007 er galdandi, at gjørdar avtalur millum handverkara og meistara ikki mugu gerast verri orsakað av hesari avtalu. Broytingar í slíkum avtalum skulu tí varslast við uppsagnarfreist.

## § 20. Yvirtíðarløn

Stk. 1. Yvirtíðin verður goldin soleiðis fyri bæði handverkarar og serarbeiðarar:

| | |
|---|---|
| Fyri fyrstu 4 tímarnar, vanlig løn | + 35 % |
| Fyri næstu 3 tímarnar, vanlig løn | + 60 % |
| Fyri fylgjandi tímar, vanlig løn | + 100 % |
| Leygardag.................. | + 100 % |

Stk. 2. Sunnu- og halgidagar og frídagar verða goldnir við 100%, ið líkaleiðis verða at standa við í neyðugum framhaldsarbeiði.
Stk. 3. Fyri arbeiði í mattíð verður goldin tvífald løn.
Stk. 4. Yvirtíð - um arbeitt verður meira enn 8 tímar á vaktini - við skiftisarbeiði eins og sunnu- og halgidagar verður goldið eftir stk. 1 í hesi grein.
Stk 5. Tá arbeiði endar aftaná midnátt, og færri enn 6 tímar eru, til byrjað verður aftur, verður ikki farið niður í løn.

## §21.

Stk. 1. Yvirarbeiðstíð verður ikki roknað, fyrrenn vanligi arbeiðsdagurin sambært avtalu er vunnin (8 tímar), um høvi hevur verið til tess. Undantikið er tó sjúka og náttararbeiði, ið stends av meistarans ella virkisins ávum.
Stk. 2. Tá ið limur verður boðsendur av meistara uttanfyri vanliga arbeiðstíð, verður goldin vanlig sáttmálaløn + hesi ískoyti:

| | | |
|---|---|---|
| + 35% | í tíðini | kl. 18 - 21 |
| + 60% | í tíðini | kl. 21 - 24 |
| + 100% | í tíðini | kl. 24 - 06 |

Tá arbeiði endar aftaná midnátt, og færri enn 6 tímar eru, til byrjað verður aftur, verður ikki farið niður í løn.

**§ 22. Útgjalding**

Stk. 1. Lønin verður goldin eftir fastari skipan annaðhvørt fyri eina viku ella tvær vikur ísenn. Um serlig avtala verður gjørd millum einstøk virkir og avvarandi fakfelag (Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna), kann lønarútgjalding tó fara fram fyri ein mánaða í senn.
Stk. 2. Saman við útgjaldingini skal vikuseðil (-seðlar) fylgja við.
Stk. 3. Meistarin skal rinda løn, frítíðarløn, eftirlønargjald og møguliga onnur gjøld, sum meginfeløgini semjast um, um A-skattaskipanina.
Stk. 4. Øll sáttmálatengd gjøld verða framd samstundis sum lønarflytingar.

**§ 23. Tilkallivakt**

Handverkari, sum hevur tilkallivakt, verður frá mánadegi til og við fríggjadag kl. 24.00 løntur við vaktargjaldi, ið er 13,73% av vanligari sáttmálaløn sambært grein 10. ~~á kr. 15 um tíman.~~ Eftir fríggjadag til vanliga arbeiðstíð mánamorgun verður handverkari løntur við vaktargjaldi ~~á kr. 30 um tíman.~~, ið er 27,45% av vanligari sáttmálaløn sambært grein 10. Fyri tilkallivakt halgidagar og fastar frídagar verður vaktargjaldi eins og í vikuskiftinum.

## Kapittul 5: Gjøld

**§ 24. Limagjald**

Stk. 1. Á hvørjum arbeiðsplássi kann verða avtalað, hvørt meistari skal eftirhalda limagjald hjá limum í handverkarafeløgum.
Stk. 2. Vanligur meiriluti av handverkarum, serarbeiðarum og meistara á arbeiðsplássinum skal vera fyri hesum og atkvøðast skal við seðlum.
Stk. 3. Verður avtalað, at meistari skal eftirhalda limagjald, verður hetta at rinda til avvarandi handverkarafelag eftir nærri avtalu.

**§ 25. Útbúgvingargrunnur**

Til útbúgvingar- og eftirútbúgvingar av handverkarum og handverksmeistarum gjalda handverkarar og handverksmeistarar hvør ~~10 oyru~~0,07% av vanligari sáttmálaløn sambært grein 10 í grunn av hvørjum arbeiðstíma.

**§ 26. Eftirløn og lívstrygging**

Stk. 1. Meistararnir rinda 13% av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.
Stk 2. Tá arbeiðsfólk, sum hevur verið í minsta lagi 1 ár í starvi hjá verandi arbeiðsgevara,

doyr, meðan hann/hon er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/sambúgvi ella børn undir 18 ár, sum arbeiðsfólk hevur skyldu at uppihalda, rætt til eftirsitiløn fyri tann mánaðin, tá viðkomandi doyr, og 3 mánaðar fram.
Fyri tímalønt verður lønin roknað sum miðaltalið av tí løn, sum er útgoldin av verandi arbeiðsgevara seinastu 12 mánaðirnar, sum viðkomandi hevur verið til arbeiðis.
Stk. 3. Eftirlønargrunnurin er bæði fyri sveinar og serarbeiðarar í handverksfakinum.
Stk. 4. Tá handverkari er fyltur 67, verður lønarkvotienturin svarandi til eftirlønargjaldið útgoldin sum løn. Sama er galdandi fyri persónar, sum samb. § 1, stk . 5 í eftirlønarlógini eru frítiknir fyri at rinda í eina føroyska eftirlønarskipan.

## Kapittul 6: Aðrar ásetingar

### § 27. Etingar- og klædnarúm

Víst verður til ásetingar í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi nr. 52 frá 4. mai 2017 og kunngerðir.

### § 28. Arbeiðsklæðir, verndarklæðir og útsúgving

Stk. 1. Bakarar fáa frí arbeiðsklæðir.
Stk. 2. Sveisarar, maskinsmiðir og aðrir, ið hava við sveisi-, skeri- og slípiarbeiði at gera, fáa ókeypis verndarklæði, so sum svintu, ermar, handskar o.a. frá meistaranum.
Stk. 3. Tá ið sveisað verður inni í tanga, skal útsúgving vera.
Stk. 4. Arbeiðsgevari útflýggjar arbeiðsklæði til handverkarar, um ikki onnur skipan er galdandi. Arbeiðsgevarin ger tá av, hvørji klæði og hvussu ofta hesi kunnu verða útflýggjað. Ynskir handverkari onnur ella dýrari klæði, rindar hann munin. Viðvíkjandi trygdar- og verndarútgerð verður víst til kunngerð nr. 131 frá 4. september 1995 um persónliga verndarútgerð.

### § 29.

Tær eftirlitsskipanir, sum arbeiðsgevarin setir í verk, skulu vera grundaðar á trygd og/ella á rakstrarlig atlit, og hava eitt skynsamt endamál.

Eftirlitsskipanir skulu ikki føra við sær óneyðugan ampa fyri arbeiðsfólkini, og rímiligur samanhangur skal vera millum endamálið við eftirlitinum og tann hátt, sum eftirlitið verður framt.
Arbeiðsgevarin skal skrivliga kunna arbeiðsfólkini, áðrenn eftirlitsskipan verður sett í verk.
Er neyðugt at seta í verk eftirlit uttan at til ber at boða frá, skal arbeiðsgevarin tó skjótast til ber boða arbeiðsfólkunum frá, at eftirlitsskipanin er sett í verk, og hvør orsøkin er til hetta.

### §30.

Partarnir eru samdir um, at tað er av týdningi, at handverkarar verða mentir við upplæring, eftirútbúgving og skeiðsluttøku.

Tá handverkara verður álagt at fara á skeið, verður hetta avroknað sambært hesum sáttmála umframt møguligar viðbøtur, tó í mesta lagi 8 vanligar tímar um dagin. Hetta er eisini galdandi, um hesi skeið fella á leygardag, sunnudag ella fastan frídag.

## Kapittul 7: Skipanarviðurskifti

**§ 31.**

Partarnir eru samdir um, at teir hava felags áhuga í, at allir arbeiðsgevarar/meistarar eru skipaðir sum limir í arbeiðsgevarafeløgunum, og at allir handverkarar eru skipaði sum limir í handverkarafeløgunum.

Arbeiðsgevarafelagið/Handverksmeistarafelagið arbeiðir fyri at kunna arbeiðsgevarar/ meistarar um teir fyrimunir, sum eru við limaskapi í arbeiðsgevarafelag og at arbeiða fyri slíkum limaskapi. Somuleiðis arbeiða handverkarafeløgini fyri at kunna handverkarar um teir fyrimunir, sum eru við limaskapi í handverkarafeløgunum og eisini at arbeiða fyri slíkum limaskapi.. Partarnir arbeiða fyri at tryggja at verandi sáttmálar verða hildnir.

Handverkarar og meistarar hava skyldu at siga feløgunum frá, tá ið óskipaðir handverkarar ella meistarar arbeiða á sama arbeiðsstað.

**§ 32. Arbeiðsmans arbeiði**

Um handverkari, sum er settur eftir handverkarasáttmálanum, ger arbeiðsmans arbeiði, skal hann ikki fara niður í løn.

**§ 33. Viðurskiftir hjá nevndarlimum**

Stk. 1. Um limur kennir seg nervaðan, av tí at hann er nevndarlimur í handverkara- ella handverksmeistarafelag, kann hann kæra til nevndina, ið hann er limur í.
Stk. 2. Nevndin skal viðgera kæruna beinanvegin og áðrenn 3 dagar senda hana við einum tilmæli til meginfelag sítt.
Stk. 3. Meginfelagið, ið hevur fingið kæruna, skal viðgera hana beinanvegin.
Stk. 4. Er kæran av slíkum slag, at hon viðkemur báðum meginfeløgunum, skal felagsfundur verða sum skjótast og áðrenn 3 dagar frá tí degi, at annað meginfelagið hevur fingið kæruna frá heimafelag.

**§ 34. Ósemja um arbeiðið**

Stk. 1. Verður ósemja um arbeiði, sum ikki er tilskilað í sáttmálanum, skulu feløgini samráðast

um arbeiðs- og lønarviðurskifti hesum viðvíkjandi, áðrenn farið verður til nevndarviðgerð.
Stk. 2. Allar trætur um rættu fatan av sáttmálanum verða avgjørdar av eini nevnd.
Stk. 3. Hvørt felag sær velur 2 limir til nevndina. Kemur nevndin ikki ásamt, verður dómarin ella annar av honum nevndur persónur uppmaður. Hansara avgerð verður at taka til fulnar.

### § 35. Álitismannaskipan

Álitismannaskipanin er viðurkend av báðum feløgunum. Sí reglugerð fyri álitismannaskipanina.

### § 36. Sersáttmáli

Limafeløgini kunnu gera sersáttmála sínámillum, tó skal ein tílíkur sáttmáli ikki stríða ímóti sáttmálum meginfelaganna.

## Kapittul 8: Gildi og uppsøgn

### § 37. Gildi og uppsøgn

Stk. 1. Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober ~~2018~~ 2020 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast av báðum pørtum við 2 mánaða freist, til ein 1. oktober, tó í fyrsta lagi til 1. oktober ~~2020~~2022.

Tórshavn, hin ~~10~~15. oktober ~~2018~~2020

**Fyri Føroya Handverkarafelag**
Suni Simonsen, form.

**Fyri Landsfelag Handverkaranna**
Daniel P. Djurhuus, form.

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**
~~Bogi Jacobsen, formaður~~ Kristoffur Laksá

**Fyri Føroya Handverksmeistarafelag**
Magnus Magnussen, form.

## Álitismannaskipan

1. Á arbeiðsplássum har 5 ella fleiri fólk eru í vinnu, kunnu tey velja sær álitisfólk fyri 2 ár í senn.

2. Álitisfólk skulu hava neyðuga kunning um tiltøk, sum ætlanin er at fremja, og sum kunnu hava ávirkan á arbeiðsumstøður.

3. Arbeiðsgevarin og nevndin í avvarðandi yrkisfelag skulu hava skrivliga fráboðan um, hvør er valdur sum álitisfólk.

4. Álitisfólkið er umboðs- og tingingarfólk við arbeiðsgevaran ella umboðsfólk hansara og skal gera sítt ítarsta til, at arbeiðið fer siðiliga fram á arbeiðsplássinum.

Arbeiðsgevarin og álitisfólkið eiga í felag at fremja eitt gott samstarv á arbeiðsplássinum.

5. Partarnir eru samdir um at arbeiða fyri best møguligum trygdar-, heilsu- og trivnaðarviðurskiftum á arbeiðsplássunum.

Endamálið er at skapa trygd, trivnað og menning á arbeiðsplássunum og at stimbra áhugan hjá starvsfólkunum og leiðslu fyri teimum arbeiðsuppgávum, sum áliggja. Viðvíkjandi trygdar- og heilsuviðurskiftum verður víst til galdandi arbeiðsumhvørvislóg.

Leiðsla og starvsfólk skulu í felag miða eftir, at tey krøv, sum frammanfyri eru sett til heilsuumstøður og trivnaðarviðurskifti, verða rokkin.

Heilsu- og trivnaðarpolitikkur fyri arbeiðspláss.

Arbeiðsgevarar skulu bera so í bandi:

- At arbeiðsumstøðurnar eru soleiðis skipaðar, at minst møguligur vandi er fyri strongd millum arbeiðsfólkini

- At tiltøk verða framd, sum skulu tryggja gott samstarv millum leiðslu og arbeiðsfólk og millum arbeiðsfólkini sínámillum

- At happing ikki fer fram á arbeiðsplássinum

- At møgulig kærumál um heilsu- og trivnaðarviðurskifti beinanvegin verða tikin upp og verða viðgjørd millum leiðslu, álitisfólk og trygdarumboð

- At neyðug tiltøk verða framd fyri at bøta um viðurskiftini, um tað vísir seg, at tey viðurskiftini, sum nevnd eru frammanfyri, ikki eru nøktandi.

6. Álitisfólkið skal bera fram klagur og tilmæli frá arbeiðsfeløgum til arbeiðsgevaran ella, um hann ikki er at hitta, so til umboð hansara.

Álitisfólkið hevur eisini átalurætt viðvíkjandi ótrygd á arbeiðsplássinum, sí annars LØGTINGSLÓG NR. 70 FRÁ 11. MAI 2000 UM ARBEIÐSUMHVØRVI, SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 18 FRÁ 8. MAI 2008

Og eisini hevur álitisfólkið átalurætt viðvíkjandi málum, sum nevnd eru í 5. petti.

7. Um álitisfólk, tá samráðing er farin fram, ikki er komið til eina loysn við leiðsluna á arbeiðsplássinum, sum starvsfólkini kunnu góðtaka, skal málið beinanvegin verða lagt fyri viðkomandi fakfelag.

Álitisfólk og starvsfólk kunnu ikki niðurleggja arbeiðið, fyrrenn nærri boð eru komin frá avvarandi fakfelag.

8. Álitisfólkið hevur rætt til at fáa frí at røkja uppgávur sínar sum álitisfólk. Skyldurnar hjá arbeiðsfólkinum skulu fremjast soleiðis, at tað tarnar framleiðsluni sum minst. Leiðslan skal skjótast til ber hava boð um fráveruna.

Í hesum føri, eins og tá leiðslan boðsendir álitisfólki um mál, sum hava við starvsfólk ella arbeiðsviðurskifti at gera, skal álitisfólkið fáa ta vanligu lønina fyri ta tíð, tað er úr arbeiði.

9. Uppsagnartíðin hjá álitisfólki er uppsagnartíð sambært høvuðssáttmálanum + 1 mánaði.

Uppsøgnin skal grundgevast og bert fremjast av ávísari neyðugari ørsøk. Stendst uppsøgnin av vinnuloysi, er sama galdandi fyri álitisfólk sum fyri starvsfólkini annars.

10. Verður ósemja um uppsøgn álitisfólksins, verður hon at viðgera eftir § 35 Stk. 3. Tekur slík ósemja seg upp, skulu feløgini beinan vegin taka upp samráðingar, áðrenn farið verður til gerðarrætt.

Fastheldur arbeiðsgevarin uppsøgn sína hóast gerðarrættaravgerð, sum gongur honum ímóti, ásetur gerðarrætturin tað endurgjald, sum hann verður at rinda álitisfólkinum.

Støddin av hesum verður at áseta eftir teim fyriliggjandi umstøðunum, men kann tó ikki setast til meira enn 3 mánaðarlønir sambært setanarskrivinum hjá viðkomandi.

11. Tiltaksfólk fyri álitisfólk, sum skal vera á staðnum, tá álitisfólk hevur forfall, skulu virka undir somu treytum og hava somu sømdir sum álitisfólkini.

12. Um so er, at starvsfólkini semjast um at velja eitt nýtt álitisfólk, kann slíkt val fara fram sambært punkt 3 frammanfyri.

13. Broytingar í hesi álitismannaskipan kunnu bert verða gjørdar í sambandi við sáttmálatingingar.

14. Um so er, at ivamál taka seg upp viðvíkjandi hesi skipan, verða tey at leggja fyri gerðarrættin sambært § 35 Stk. 3.  í sáttmálanum millum feløgini.

# FASTLØNARSÁTTMÁLI

**§ 1. Setan**

Stk. 1. Hesin sáttmáli fevnir um allar handverkarar, sum arbeiðsgevarar vilja seta við fastari løn.
Stk. 2. Arbeiðsgevarar, sum longu hava fastlønarsáttmála við handverkara, tá ið hesin sáttmáli kemur í gildi, kunnu alsamt nýta sín sáttmála, men teir handverkarar, ið verða settir við fastari løn eftir 1.oktober 1991, skulu setast eftir hesum sáttmála.
Stk. 3. Setanarprógv verða givin sambært løgtingslóg um setanarprógv.

**§ 2. Løn**

Stk. 1. Handverkarar settir eftir fastlønarsáttmálanum fáa eina løn, sum minst er galdandi sveinaløn í høvuðssáttmálanum ganga við mánatímatalinum á 173,33 tímar. Tað er annars upp til partarnar at finna eina hóskandi løn.
Stk. 2. Fyri starvsfólk sett innan 1. oktober 2007 er galdandi, at gjørdar avtalur millum handverkara og meistara ikki mugu gerast verri orsaka av hesari avtalu. Broytingar í slíkum avtalum skulu tí varslast við uppsagnarfreist.
Stk. 3. Tann í stk. 1 ásetta løn er treytað av fullari arbeiðstíð, t.e. 40 tímar um vikuna.
Stk. 4. Fyri handverkarar við niðursettari arbeiðstíð verður lønin roknað lutfalsliga í mun til niðursetta tímatalið.

**§ 3. Yvirtíðarløn**

Stk. 1. Fyri yvirtíðararbeiði verður goldin yvirtíðarløn eftir § 20 í sáttmálanum um tímalønir millum handverkara- og meistarafelagið.
Stk. 2. Í tíðarskeiðinum frá og við mánadag til og við fríggjadag millum kl. 6.00 og 18.00, fær handverkari við niðursettari arbeiðstíð bert yvirtíðargjald fyri arbeiði aftaná fult dagsarbeiði, sum er 8 tímar. ~~Handverkari við niðursettari arbeiðstíð fær bert yvirtíðargjald fyri arbeiði aftaná fult dagsarbeiði.~~
~~Stk. 3. Er arbeiðstíðin t.d. 30 tímar um vikuna, og arbeitt verður ein dag í 9 tímar, verður eykalønin: Vanlig handverkara tímaløn fyri 2 tímar, og yvirtíðarløn sambært stk. 1 í hesi grein fyri 1 tíma.~~

**§ 4. Avspassering**

Yvirtími, sum er út yvir 40 tíma viku, sum verður avspákaður, skal avspákast í mun til virði á honum

**§ 5. Tænastuferðir**

Arbeiðsgevarin rindar allar útreiðslur í sambandi við tænastuferðir.

**§ 6. Fastir frídagar**

1. mai og ólavsøkudagur eru heili~~u~~r frídaga~~u~~r. Flaggdagur, grundlógardagur, 1.november og jólaaftan eru frídagar aftan á kl.12.

**§ 7. Frítíðarreglur**

Frítíð verður veitt handverkara eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn.

**§ 8. Farloyvi o.a.**

Stk. 1. Handverkari skal verða loyvt at fáa farloyvi uttan løn, um so er, at tað ikki stríðir ímóti áhugamálum arbeiðsgevarans.
Stk. 2. Tá ið álitisfólk søkja um at sleppa á álitismannaskeið, eigur arbeiðsgevarin at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í handverkarafeløgum.

**§ 9. ~~Barnsferð~~Barsilsfarloyvi**

Stk. 1. Løntakari, sum er settur í starv eftir hesum sáttmála eigur rætt til barsilsfarloyvi sambært galdandi lóggávu. ~~Handverkari, ið er við barn, eigur at siga arbeiðsgevaranum frá 3 mánaðir, áðrenn hon væntar sær at eiga. Ger hon ikki tað, kann arbeiðsgevarin siga henni upp frá tí degi, hon gerst óarbeiðsfør.~~

**§ 10. Reglur fyri sjúkraløn, eftirsituløn o.a.**

Stk. 1. Sjúka
Viðvíkjandi løn undir sjúkralegu, eftirsituløn o.a. verða reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 30. mars 1958 um starvsmenn at galda.

**§ 11. Uppsøgn**

Stk. 1. Starvsavtala kann sigast upp til uppathald við einum mánaða freist til tann fyrsta í einum mánaða, uttan so at avtala er, at arbeiðið er bert fyribils ella sum roynd, og at hesi arbeiðsviðurskifti vara ikki longur enn 3 mánaðir.
Eftir 2 ára starvstíð kann starvsavtala sigast upp við 3 mánaða freist.
Eftir 5 ára starvstíð kann starvsavtala sigast upp við 4 mánaða freist.

Fyri handverkarar settar í starv innan 1. oktober 2005 eru reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 30. mars 1958 um starvsmenn galdandi.

Stk. 2. Uppsagnartíðin frá handverkara síðu er leypandi mánaði + 1 mánaða.

**§ 12. Útbúgvingargrunnur**

Til útbúgvingar- og eftirútbúgvingar av handverkarum og handverksmeistarum gjalda handverkarar og handverksmeistarar hvør 0,07% av vanligari sáttmálaløn sambært grein 10 í høvuðssáttmálanum~~10 oyru~~ í grunn av hvørjum arbeiðstíma.

**§ 13. Eftirlønargrunnur**

Frá 1. oktober 2007 rinda meistararnir 11% av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna. 1. oktober 2008 hækkar gjaldið við 1% til 12%. 1. oktober 2009 hækkar gjaldið við 1% til 13%.

**§ 14. Arbeiðsklæði, verndarklæði og útsúgving**

Grein 28 í høvuðssáttmálanum um arbeiðsklæði, verndarklæði og útsúgving er eisini galdandi fyri fastløntar handverkarar.

**§ ~~14~~15. Seravtalur**

Í sáttmálatíðini skal vera møguligt at gera seravtalur millum Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna.

**§ ~~15~~16. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. oktober ~~2014~~2020, og kann uppsigast av báðum pørtum við 2 mánaða fráboðan, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi tann 1. oktober ~~2016~~2022.

***Protokollat um sáttmála um frálandavinnu:***
*Partarnir eru samdir um at taka upp samráðingar um ein sáttmála fyri handverkarar, sum arbeiða í frálandavinnu á føroyska landgrunninum.*

*Miðað verður ímóti, at hetta arbeiði er liðugt 1. juni 2015.*

# Lærlingasáttmáli

**millum**

**Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkaranna**

**og**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag & Føroya Handverksmeistarafelag.**

**§ 1. Avtaluøkið**
Hesin sáttmáli er galdandi fyri handverkslærlingar, sum eru undir útbúgving sambært yrkisútbúgvingarlógini, og sum eru í starvi hjá meistarum/virkjum, sum eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag.

**§ 2. Arbeiðstíð**

Stk. 1. Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar frá 1. januar 1980 sambært løgtingslóg nr. 37 frá 1. juni 1978. Tann dagliga arbeiðstíðin er tann sama, sum er galdandi fyri hini starvsfólkini á virkinum (sveinarnar).
Meistarin hevur skyldu til at rinda lærlinginum løn fyri tað vikutímatal, sum avtalað er í lærusáttmálanum.

Stk. 2. Er lærlingur burtur frá arbeiði/skúla uttan lógliga grund, hevur virkið/meistarin ikki skyldu at rinda lærlinginum løn fyri tíðarskeiðið, lærlingurin er burtur.

**§ 3. Skiftisarbeiði**

Lærlingar kunnu arbeiða í skiftisvaktum á sama hátt sum sveinarnir.
Skiftisvaktarviðbótin verður goldin við somu prosentsatsum sum lærlingalønin av sveinalønini.
Tá ið arbeitt verður í skiftum, verður mattíðin ikki frádrigin fyri 2. og 3. holdið.

**§ 4. Frítíðarløn**

Víst verður til løgtingslóg um Frítíð við løn. Lærlingurin fær frítíðarløn, p.t. 12%.

**§ 5. Barsil**

Víst verður til løgtingslóg um Barsilsskipan.

**§ 6. Sjúka**

Viðvíkjandi sjúku verður víst til løgtingslóg um dagpening vegna sjúku. Um arbeiðsgevari í aðramáta ynskir læknaváttan, er hetta fyri arbeiðsgevarans rokning.

~~Læknaváttan skal leggjast fram, um so er at meistarin ella virkið krevur tað (hóast dagpeningaskipanina).~~

## § 7. Frídagar

Ásetingarnar um frídagar í høvuðssáttmálanum eru eisini galdandi fyri lærlingar. Í løtuni eru frídagarnir hesir: 1. mai, ólavsøkudagur og nýggjársaftan eru heilir frídagar. Flaggdagur, grundlógardagur, 1.november og jólaaftan aftaná kl. 12.00. Meistarin rindar ikki løn fyri frídagar og halgidagar, men rindar 1,5% í eftirlønargrunn fyri hetta.

## § 8. Løn

Lærlingar fáa ta til eina og hvørja tíð galdandi løn, sum er avtalað millum Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Tað er:
1. árið 35% av sveinalønini
2. árið 40% av sveinalønini
3. árið 50% av sveinalønini
4. árið 60% av sveinalønini
5. árið 70% av sveinalønini.

Lærlingur byrjar altíð á 1. árið. Er lærutíðin tildømis 3 ár, byrjar lærlingur á 1. ári og heldur so fram á 2. og 3. ári. Undantak er tó, tá ið lærutíðin verður stytt. Tá verður tað stytta tíðarskeiðið drigið av tí 1.árinum. Fær lærlingur tildømis 20 vikur stytta lærutíð, verður lærutíðin á 1. árið 32 vikur. Síðani flytur lærlingurin á 2. árið osv.

## § 9. Løn í skúlatíðini

Tá ið lærlingur er í skúla, hevur meistarin skyldu til at rinda honum løn.

## § 10. Koyring og burturarbeiði

§19 í høvuðssáttmálanum um koyring og burturarbeiði hjá handverkarum og serarbeiðarum er eisini galdandi fyri lærlingar.

## § 11. Eftirløn

Meistararnir rinda 13% av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.

Eftirløn í §7 er íroknað hesa eftirløn.

## § 12. Lønarútgjalding

Stk. 1. Lønin verður goldin eftir fastari skipan annaðhvørt fyri eina viku ella tvær vikur ísenn.
Stk. 2. Saman við útgjaldingini skal vikuseðil (-seðlar) fylgja við.
Stk. 3. Øll sáttmálatengd gjøld verða framd samstundis sum lønarflytingar.

**§ 13. Yvirtíð**

Fyri yvirarbeiði verður øll læruárini goldið serarbeiðaraløn á 1. árið + hesi prosent:
Fyrstu 4 tímarnar + 35%
Næstu 3 tímarnar + 60%
Fylgjandi tímar + 100%

**Leygardag**:
Fyrstu 5 tímarnar + 35%
Fylgjandi tímar + 60%
**Sunnu- og halgidagar**: + 100%

Yvirtími, sum er út yvir 40 tíma viku/8 tímar um dagin, kann verða avspákaður, um arbeiðsgevari og lærlingur eru samd um hetta. Avspákað verður tíma fyri tíma og meirvirði verður útgoldið.

**§ 14. Arbeiðssteðgur**

Lærlingur kann ikki luttaka í arbeiðssteðgi á arbeiðsmarknaðinum.

**§ 15. Forskotin tíð**

Fyri arbeiðir innanfyri hesi tíðarskeið verða goldnar hesar viðbøtur (forskotin tíð). Viðbøturnar verða roknaðar av serarbeiðaraløn á 1. árið.~~:~~

| **Yrkið** | **Tíðarskeið** | **Viðbót 1. oktober 2~~005~~2020** |
|---|---|---|
| Bakaralærlingar | Allir dagar millum kl. 18.00-04.00 | ~~35,00~~26,45% |
| | Sunnu- og halgidagar kl. 00.00-24.00 (alt døgnið) og frídagar | ~~25,00~~18,89% |
| Kokka- og tænaralærlingar | Gerandisdagar kl. 18-06 | ~~4,00~~3,03% |
| | Leygardagar, sunnu- og halgidagar | ~~5,50~~4,16% |
| Frisørlærlingar | Sunnudag | Verður goldið eins og yvirtíð hjá lærlingum |

**§ 16. Limagjald**

§ 24 í høvuðssáttmálanum er galdandi fyri lærlingar. Greinin er p.t. soljóðandi:
" Stk. 1. Á hvørjum arbeiðsplássi kann verða avtalað, hvørt meistari skal eftirhalda limagjald hjá limum í handverkarafeløgum.
Stk. 2. Vanligur meiriluti av handverkarum, serarbeiðarum og meistara á arbeiðsplássinum skal vera fyri hesum og atkvøðast skal við seðlum.
Stk. 3. Verður avtalað, at meistari skal eftirhalda limagjald, verður hetta at rinda til avvarandi handverkarafelag eftir nærri avtalu."

**§ 17. Arbeiðsklæði, verndarklæðir og útsúgving**

Grein 28 í høvuðssáttmálanum um arbeiðsklæði, verndarklæði og útsúgving er eisini galdandi fyri lærlingar.

**§ ~~17~~18. Gildi og uppsøgn**

Hesin sáttmáli kemur í gildi 1. oktober ~~2018~~2020. Sáttmálin kann sigast upp við 2 mánaða ávaring til ein 1. oktober, fyrstu ferð 1. oktober ~~2020~~2022.

~~Hesin sáttmáli er ikki galdandi fyri lærlingar, sum eru byrjaðir sum lærlingar fyri 1. oktober 2005, tó kunnu partarnir avtala at nýta henda sáttmála.~~

Tórshavn, tann ~~10~~15. oktober ~~2018~~2020

**Fyri Føroya Handverkarafelag**
Suni Simonsen, form.

**Fyri Landsfelag Handverkaranna**
Daniel P. Djurhuus, form.

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**
~~Bogi Jacobsen, formaður~~Kristoffur Laksá

**Fyri Føroya Handverksmeistarafelag**
Magnus Magnussen, form.

# REGLUGERÐ FYRI VITAN

**Eftirútbúgvingargrunnur**
**stovnaður 1. januar 1990**

## § 1. Navn og heimstaður

Stk. 1. Navn grunnsins er Vitan.
Stk. 2. Ognarar grunsins eru Føroya Handverkarafelag (FHF) / Landsfelag Handverkaranna (LH) og Føroya Handverksmeistarafelag (FHMF).
Stk. 3. Grunnurin hevur heimstað í Tórshavnar Kommunu.

## § 2. Endamál

Stk. 1. Høvuðsendamál grunnsins er at veita fíggjarligan og tekniskan stuðul til limirnar í feløgunum, ið ætla sær á eftirútbúgvingarskeið.
Stk. 2. Nevndin kann í einstøkum førum taka avgerð um at nýta pening til annað enn eftirútbúgving.

## § 3. Treytir fyri stuðli

Treytirnar fyri at kunna fáa stuðul eru, at:
a. Umsøkjarin er virkandi limur í handverkarafelag, ið aftur er limur í FHF / LH og meistari ella virkið hansara er limur í lokalum meistarafelag ella beinleiðis í FHMF.

b. Umsøkjarin og meistarin báðir halda sínar skyldur viðvíkjandi inngjaldi í Vitan.

c. Viðkomandi innanfyri seinastu 4 vikurnar, áðrenn at eftirútbúgvingin fer fram, hevur starvast hjá handverksmeistara ella sjálvur hevur verið handverksmeistari.

d. Felagsgjaldið er goldið.

## § 4. Stovnsfæ

Feløgini hava við sáttmála avtalað inngjald í grunnin. Rentan av kapitalinum hjá grunninum fer til at viðlíkahalda stovnsfæ grunsins.

## § 5. Veitingar

Stk.1. Veitast kann úr grunninum:
a) Inngjaldið um árið
b) Annar peningur, sum á annan hátt fellur til grunnin.
c) Peningur sambært a og b, sum ikki var nýttur undanfarna ár

**§ 6. Inngjalding**

Stk. 1. Handverksmeistarin hevur skyldu at taka gjald handverkaranna av lønini við hvørja lønarútgjalding og inngjalda tað til grunnin, eins og hansara egna gjald samstundis skal gjaldast inn.
Stk. 2. Handverksmeistarin skal avrokna gjaldið til grunnin við hvørja lønarútgjalding ella eftir avtalu við grunnin.
Stk. 3. Um handverksmeistarin hevur meir enn ein handverkara í starvi, kann samlaða gjaldið fyri hvørja lønútgjalding avroknast til grunnin í einum.
Stk. 4. Samstundis sum avroknað verður, skal eitt útgreinað yvirlit yvir persónar, tímatal og tíðarskeið latast tí, ið umsitur grunnin.
Stk. 5. Hevur handverksmeistari skuld til grunnin, ið er eldri enn ein mánaður sambært fyriskrivaðum reglum ella gjørdari avtalu, og henda skuld ikki er goldin í seinasta lagi 8 dagar eftir, at hann er kravdur, kann henda skuld verða innheintað á vanligan hátt.

**§ 7. Umsiting**

Stk. 1. Til at stjórna grunninum verður vald ein nevnd við fimm limum. Hon skal hava umsitingina av grunninum um hendi og taka avgerð um øll mál, sum hoyra grunninum til.
Stk. 2. Nevndin í FHMF velur tveir limir, meðan nevndirnar í FHF og LH velja hvør sín lim. Fimti limurin verður valdur av hinum fýra í felag.
Stk. 3. Nevndin verður vald fyri tvey ár í senn, og kann nevndarlimur veljast aftur.
Stk. 4. Nevndin kann taka sær serkøna hjálp, ið verður lønt av inntøkum grunnsins.
Stk. 5. Umsitingarútreiðslur grunnsins og samsýningar til nevndarlimir skulu verða góðkendar av feløgunum, og verða goldnar av inngjaldi grunnsins.

**§ 8. Umsókn**

Stk. 1. Umsókn um stuðul skal skrivast á serligt umsóknarblað, ið nevnd grunnsins letur gera til endamálið.
Stk. 2. Saman við umsóknini skal fylgja kostnaðarmeting av útreiðslunum av eftirútbúgvingini, ið umsøkjarin ætlar at luttaka í, og kann grunnurin so út frá hesum upplýsingum játta stuðul.
Stk. 3. Øll útgjøld av stuðli eru tó treytað av skjalprógvaðum útreiðslum.
Stk. 4. Í hvørjum fíggjarári skal nevndin miða ímóti, at eitt rímiligt samsvar er ímillum inngjald og játtaðan stuðul til teir einstøku umsøkjararnar.

**§ 9. Roknskapur**

Stk. 1. Roknskapur grunnsins gongur frá 1. januar til 31. desember.
Stk. 2. Grannskoðaður roknskapur skal verða framlagdur á árligu aðalfundum felaganna.
Stk. 3. Grannskoðari verður útnevndur av nevndini.

**§ 10. Broytingar**

Henda reglugerð kann verða broytt, um nevndarlimur í grunninum ella felag heldur tað vera neyðugt, men broytingarnar skulu verða lagdar fyri feløgini til góðkenningar.

**§ 11. Avtøka**

Um feløgini verða samd um at avtaka grunnin, verða ognir grunnsins gjørdar upp, men megu tó ongantíð falla aftur til feløgini sjálvi, men latast til eitt tá ávíst gott endamál, innan tað øki, ið feløgini virka í, og sum feløgini verða samd um.

**§ 12. Stovnseting**

Hesin eftirútbúgvingargrunnur er settur á stovn í samband við sáttmálasamráðingar millum handverkarar og handverksmeistarar í mai 1989 og skal byrja virki sítt 1. januar 1990.

Reglugerðin samtykt av meginfeløgunum í desember 1989, broytt í desember 1998, mai 2002 og november 2008.

**Føroya Handverkarafelag**
Poul Øregaard, form.

**Landsfelag Handverkaranna**
Dániel P. Djurhuus

**Føroya Handverksmeistarafelag**
Vilhelm M. Johannesen, form.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Vilhelm M. Johannesen, form.

# Akkordløn hjá autolakerarum

**§ 1**

Á verkstaðum, har ið umstøðurnar eru til tess, kunnu meistarar og sveinar avtala at nýta henda sáttmála í sambandi við autolakering.

**§ 2**

Stk. 1. Akkordlønin fyri autolakering verður sambært hjálagdu talvu.
Stk. 2. Fyri metalikklakk verður goldið 25% eyka. Fyri hvørja periodu verður goldið kr. 11.32.

**§ 3.**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. januar 1994 og kann sigast upp við 2 mánaða ávaring til ein 1. oktober, fyrstu ferð 1. oktober 1994.

Tórshavn, 31. januar 1994

Fyri Føroya Handverkarafelag
Høgni Højgaard, form.
Jørgen Rubeksen

Fyri Føroya Handverksmeistarafelag:
Vilhelm M. Johannesen, form.
Johan Petersen, næstf.
Jákup í Gerðinum, fyris.

| $m^2$ | | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0,0 | | 312 | 479 | 634 | 787 | 930 | 1070 | 1210 | 1350 | 1491 | 1632 |
| 0,1 | | 329 | 496 | 656 | 802 | 944 | 1083 | 1224 | 1364 | 1505 | 1646 |
| 0,2 | | 346 | 513 | 671 | 816 | 958 | 1097 | 1238 | 1378 | 1519 | 1660 |
| 0,3 | | 363 | 530 | 685 | 831 | 971 | 1111 | 1252 | 1392 | 1533 | 1674 |
| 0,4 | | 380 | 546 | 699 | 846 | 985 | 1125 | 1266 | 1407 | 1548 | 1689 |
| 0,5 | | 397 | 564 | 713 | 861 | 999 | 1139 | 1281 | 1421 | 1562 | 1702 |
| 0,6 | 244 | 414 | 580 | 728 | 874 | 1013 | 1153 | 1294 | 1435 | 1576 | 1716 |
| 0,7 | 262 | 430 | 594 | 742 | 888 | 1027 | 1167 | 1309 | 1449 | 1590 | 1731 |
| 0,8 | 279 | 447 | 608 | 758 | 903 | 1041 | 1182 | 1323 | 1463 | 1603 | 1745 |
| 0,9 | 296 | 463 | 623 | 773 | 917 | 1055 | 1196 | 1336 | 1477 | 1617 | 1759 |

| m² | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0,0 | 1773 | 1914 | 2054 | 2195 | 2335 | 2476 | 2617 | 2758 | 2899 | 3039 |
| 0,1 | 1787 | 1928 | 2068 | 2210 | 2349 | 2490 | 2631 | 2772 | 2912 | *) |
| 0,2 | 1801 | 1942 | 2082 | 2223 | 2363 | 2505 | 2645 | 2786 | 2926 | |
| 0,3 | 1815 | 1956 | 2096 | 2237 | 2378 | 2519 | 2659 | 2800 | 2940 | |
| 0,4 | 1829 | 1970 | 2110 | 2251 | 2392 | 2533 | 2673 | 2813 | 2954 | |
| 0,5 | 1843 | 1984 | 2124 | 2265 | 2406 | 2546 | 2687 | 2827 | 2969 | |
| 0,6 | 1857 | 1998 | 2138 | 2279 | 2420 | 2560 | 2701 | 2843 | 2983 | |
| 0,7 | 1871 | 2011 | 2153 | 2293 | 2434 | 2574 | 2715 | 2857 | 2997 | |
| 0,8 | 1885 | 2026 | 2167 | 2307 | 2448 | 2588 | 2730 | 2871 | 3011 | |
| 0,9 | 1899 | 2044 | 2181 | 2321 | 2462 | 2604 | 2744 | 2885 | 3025 | |

*) Fylgjandi m² v/kr. 140,-

**Skrivstovutíðir o.a.**

**Føroya Handverkarafelag**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 1075
610 Saltangará
Teldupostur: fhf@fhf.fo

Skrivari: Suni Simonsen (form.)
Teldupostur: fhf@fhf.fo
Telefon 312120
Fartlf. 212199
Telefaks 320420

Mánadag – fríggjadag
Kl. 08-16

**Føroya Arbeiðsgevarafelag/Føroya Handverksmeistarafelag**
Óðinshædd 7
Postsmoga 1038
FO-110 Tórshavn
Teldupostur: industry@industry.fo

Fyrisitari: Marita Rasmussen
Teldupostur: marita@industry.fo
Telefon 309900
Fartelefon 739909
Telefaks 309901

Mánadag - fríggjadag
kl. 08 – 16

**Landsfelag Handverkaranna.**
Stoffalág 60
Postboks 203
FO-110 Tórshavn
Telefon 354800
Telefax 314801
Teldupostur: lfh@handverk.fo

Dánjal Pauli Djurhuus, form. fartlf. 234809
Eli Brimsvík, næstform. fartlf. 234802

Mánadag - Hósdag
kl. 09 - 15